# Brøndby er sera væl fyri

**Oddaliðið klæddi-steypafinalistarnar úr OB av at skinninum sunnudagin, og AaB vann á heimavølli fyri fyrstu ferð í tveir mánaðir**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Eftir at tað hevur skinklað í tveir mánaðir, hava teir í Brøndby funnið stílin aftur. Nýggi venjarin hevur verið við til at geva íblástur og sjálvsálit, og áskoðararnir rokna við, at Brøndby fer at vinna meistaraskapin. Tað var sjón fyri søgn, tá Brøndby sunnudagin hevði vitjan av OB. Brø'nby vann 4–1, og teir vóru so nógv tað betra liðið.

FCK skal hósdagin spæla steypafinalu ímóti OB. Tí var tað sjálvsagt, at FCK hevði síni fólk millum teir 14.368 áskoðararnar. Og FCK eygleiðararnir áttu at fáa uppskriftina uppá, hvussu bilbukt skal fáast við OB. Brøndby spældi skjótt og ágangandi, og teir spældu seg ferð eftir ferð til upplagdar málmøguleikar. Teir skoraðu fýra mál, áðrenn OB slapp at pynta um. Peter Madsen, sum verður roknaður sum upplagt evni til HM hópin hjá Morten Olsen, skoraði tvey mál, og Thomas Lindrup, sum leingi hevur verið í aldudali, vísti síni góðu evni og skoraði tvey mál.

## Skandala í Vejle

Christian Høgni Jacobsen var á beinkinum allar 90 minuttirnar, tá Vejle hevði vitjan av Lyngby. Botnliðið hevur lagt rygg til eitt eyðmýkjandi tap fyri og annað eftir. Hesa ferð var tað Vejle, sum átti tørn at vinna stórt, men Vejle fekk ikki sigurin, sum teir hava roknað sum sjálvsagdan. Lyngby megnaði 2–2, og stóri kiksarin kann um tvær vikur vísa seg at verða avgerandi í royndini hjá Vejle at varðveita plássið í bestu deildini.

AaB hevði ikki vunnið á heimavølli í tveir mánaðar, tá teir sunnudagin fingu vitjan av grannunum úr Viborg. Tað sást aftur á áskoðarafjøldini. Bara 5.118 áskoðarar møttu upp, og tað var ikki nógv, tá hugsað verður um, hvussu spent tey í Ålborg eru í fótbólti.

Men hesa ferð eydnaðist hjá AaB, sum framvegis hevur møguleika at vinna bronsukrónurnar. Teir vunnu 2–1.

Mestu kappingina um bronsuna fáa teir í AaB frá FCM. Hesa ferð høvdu teir í Ikast vitjan av AB. Akademikararnir hava seinastu vikurnar verið í nánd av bronsukrónunum, men nú eru teir dotnir burtur ímillum í tí kappingini. Fyrst taptu teir trý stig á skriviborðinum, tí teir høvdu ov nógvar útlendingar á vøllinum í Århus, og so taptu teir hesa ferð 2–0.

Síðsti dysturin í triði síðsta umfarinum varð spældur í gjárkvøldið. Hann var millum Esbjerg og Silkeborg. Úrslitið í tí dystinum hevði týdning fyri møguleikarnar hjá Vejle og Christian Høgna Jacobsen eisini komandi ár at spæla í bestu deildini. At Vejle ikki megnaði at vinna ímóti Lyngby var einki minni enn ein skandala. Tað eru teir í Vejle samdir við restini av danska fótbóltsheiminum í.

Komandi vikuskifti verður spælt soleiðis: Esbjerg–FCMidtjylland, FCK–Brøndby, Lyngby–AGF, OB–AaB, Silkeborg–Vejle og Viborg–AB.

# Avloysarin hjá Toda skoraði sigursmálið



**Men Peter Møller ásannar, at tað er torført at sleppa upp í part millum teir fyrstu ellivu, tá Todi spælir væl**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

FCK fór sunnukvøldið úr Århus við øllum stigunum. Tað vóru ikki færri enn 14.368 eygnavitni, sum sóu tað. Tey flestu vóru sovorðin, sum vóru komin á Århus stadion at stuðla heimaliðnum, sum av øllum alvi stríðist fyri at sleppa undan niðurflytingini.

AGF er eitt av gomlu stórfeløgunum í Danmark. Í hesum umfarinum havav teir verið í bestu deildini síðani 1977. Men nú sær tað eitt sindur svart út. Tvey umfør eru eftir at spæla, og teir eru trý stig aftanfyri Vejle og Silkeborg, men teir hava framvegis møguleikan. Komandi sunnudag skulu teir í AGF spæla á útivølli ímóti Lyngby, sum teir eiga at hava góðar møguleikar ímóti, og annan sunnudag skulu teir spæla sannan gysara á heimavølli ímóti grannunum úr Silkeborg, sum eisini eru í vanda fyri at flyta niður.

Millum áskoðararnar í Århus vóru eisini FCK viðhaldsfólk. Og millum hesi vóru eisini nøkur av tí slagnum, sum einki fótbóltsfelag vil vita av. Dýrandi fullir ófriðakroppar úr høvuðsstaðnum gjørdu so mikið um seg í Århus, at løgreglan kendi seg noydda at leggja uppí. Fýra vórðu handtikin undan dystinum, og tilsaman tjúgu FCK viðhaldsfólk vóru eftir í brummunum í Århus, tá hini høvuðsstaðarfólkini fóru til hús aftur.

## Møller sigursmálið

Thomas Røll skoraði fyrra FCK málið, og leingi sá tað einki serligt út. Tað stóð á jøvnum, tá Hans Backe, venjarin hjá FCK, tíggju ellivu minuttir undan dystarenda gjørdi av at seta Peter Møller á vøllin fyri Toda Jónsson. Peter Møller hevði verið á vøllinum í stívliga fimm minuttir, tá hann hegnisliga lyfti bóltin í AGF málið, og so var avgjørt, at FCK skuldi vinna øll stigini.

Peter Møller var ovurfegin, tá fjølmiðlarnir flokkaðust um hann. Støðan var ikki ókend henni tvær vikur frammanundan, tá hann kom inn fyri Toda Jónsson og skoraði sigursmálið, tá FCK 21. apríl í Parkini hevði vitjan av Silkeborg. Men eykamaðurin, sum tykist vera vorðin ein supersub, sum tey siga í Onglandi, hevði bæði beinini á jørðini:

– Eg vil fegin vera við frá fyrsta bríksli hvørja ferð. Men tað er torført at vinna plássið, tí Todi Jónsson hevur spælt væl síðstu tíðina, staðfesti Peter Møller. Eina ferð var hann fastur maður í landsliðshópinum, men nú er eingin hugsningur um hjá honum at sleppa við danska landsliðnum til HM í Japan og Suðurkorea. Fyrsta takið hjá honum er at vinna sær pláss í FCK álopinum, men portrið er trongt, tí Todi Jónsson tykist eiga plássið undir liðini á Zuma.

Todi Jónsson fær í donsku miðlunum átta ella miðal skoðsmál fyri sítt avrik ímóti AGF. Nú eru Todi, Peter Møller og allir hinir í FCK farnir undir fyrireikingarnar til sera spennandi og avgerandi dagar. Hósdagin skulu teir spæla steypafinalu í Parkini ímóti OB, og sunnudagin skulu teir í næstsíðsta umfarinum – eisini í Parkini – spæla so at siga finalu um meistaraskapin ímóti Brøndby.

Í síðsta umfarinum, sum verður á skránni hósdagin í komandi viku skal FCK spæla á útivølli ímóti AaB, meðan Brøndby skal spæla á heimavølli ímóti Lyngby. Tað vil við øðrum orðum siga, at Brøndby verður heilt víst meistari, um teir vinna sunnudagin. Hjá FCK verður ein stór avbjóðing afturat at vinna á. Men teir í FCK hava stórt sjálvsálit. Teir hava ikki tapt síðani vetrarstegðin.



HB-NSÍ 4-0 (2-0)

# HB vísti tenn

**HB vísti NSÍ, hvussu fótbóltur skal spælast, tá liðini hittust í Gundadali sunnudagin. Endin var ein sannførandi sigur til havnarmenn, sum longu nú kunnu metast sum greiðir favorittar til meistaraheitið**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Eingin ivi var um, hvat betra liðið var sunnudagin, tá runavíkingar vóru á vitjan í Gundadali. HB stýrdi dystinum at kalla frá byrjan til enda, um NSÍ tó onkra hendingar ferð lá framvið hjá Bárði Johannesen í HB-málinum.

Tað var sum ikki einaferð Uni Arge, sum sendi HB á rætta kós, tá hann skoraði eftir sera vakurt uppspæl í vinstru síðu. Jón Rói Jacobsen, sum henda dagin spældi í miðverjuni saman við Jóhannusi Joensen, fekk fatur í bóltinum í vinstru síðu á egnari hálvu. Hann dró framvið einum leikara, spældi síðani bandaspæl við Andrew av Fløtum, sum sendi bóltin oman í hornið, har Jón Rói sendi innfyri til Una Arge, ið setti innaru síðu á bóltin. Jens Martin hevði ongan møguleika at bjarga skotinum. Hetta var álopsfótbóltur eftir bókini, har leikararnir spældu fyrstu ferð. HB-leikararnir numu fýra ferðir við bóltin, og so sat hann í málinum.

Hetta var eftir smáar tjúgu minuttir, men longu undan hesum hevði HB havt góðar málmøguleikar. Andrew var einaferð leysur við Jens Martini, sum bjargaði, men bólturin datt fyri føturnar á Una, ið langaði til, men hann rakti ein verjuleikara.

NSÍ royndi at svara aftur beinanvegin. Sjúrður Jacobsen hevði ta naskastu royndina hjá NSÍ í øllum dystinum. NSÍ fekk eitt fríspark úr 30 metra fjarstøðu miðskeiðis fyri málinum. Sjúrður Jacobsen langaði til við sínum vandamikla vinstra beini, men bólturin brast í stongina og út aftur í spælið. Sera óheppið og handan royndin hevði uppiborið eitt mál.

Lítla løtu seinni kom Sonni L. Petersen at standa væl fyri í brotsteiginum. Hann fór framvið einum verjuleikara og legði innfyri. Bólturin fór framvið Bárði Johannesen, men Jón Rói Jacobsen toygdi seg og beindi bóltin út til horna.

Meira hevði NSÍ ikki at bjóða uppá í álopsspælinum.

## Andrew økir

Stutt fyri hálvleik fær Andrew av Fløtum møguleikan at økja um leiðsluna, men tað kom eftir eina grova verjuvillu. Arnfinn Langgaard spælir bóltin til Djóna N. Joensen, sum er síðsti maður. Temjingin hjá Djóna miseydnaðist, og tá var Andrew kvikur á bóltinum. Andrew var leysur við Jens Martini, og tá áleyparin roynir at fara framvið garvaða málverjanum, verður hann feldur. Jens Martin fekk gult kort, men onkur vildi vera við, at tað av røttum skuldi vera reytt.

Andrew tók sær sjálvur av brotssparkinum. Hann snýtti Jens Martin við at lyfta bóltin heilt spakuliga mitt í málið. Djóni N. Joensen má avgjørt taka hetta málið á sínar herðar.

Støðan var sostatt 2-0 við steðgin, og tað tóktist ikki sum NSÍ hevði veiggið at venda dystinum. NSÍ fekk tann fyrsta møguleikan eftir steðgin, men eftir tað stýrdi HB dystinum.

Helgi L. Petersen spældi á miðvøllinum, og hann var sera ágrýtin og íðin, men einki kom burturúr hjá honum, hóast hann royndi. Pól Thorsteinsson var eisini á miðvøllinum, men hann sást ikki nógv til.

Einasti NSÍ-leikarin, sum kann vera nøgdur við sítt avrik, var Jens Martin Knudsen, hann hevði fleiri góðar bjargingar, og hann kundi lítið og einki gera við málini hjá HB.

Sigast kann um HB, at liðið stóð ógvuliga væl á vøllinum og megnaði at steðga flestu royndunum hjá NSÍ í føðingini, so tað ongantíð gjørdist veruliga vandamikið. NSÍ hevði at kalla onga roynd á HB málið eftir steðgin.

Í álopinum vóru Uni og Andrew allatíðina vandamiklir, og teir fingu góðan stuðul frá miðvøllinum.

## HB sló sigurin fastan

Ikki nógvir minuttir vóru farnir, tá HB aftur kundi økja og endaliga avgera dystin. Hesuferð var tað Hans á Lag, sum ikki júst er kendur fyri at gera mál.

Hann vann bóltin langt frammi á vøllinum, og spældi banda við Andrew. Hans gjørdist leysur og legði bóltin til vinstru fyri Jens Martin í netið.

Móti endanum fekk HB enn eitt mál. Rógvi Jacobsen varð spældur leysur av Pæturi Dahl, sum var komin inn. Jens Martin bjargar í fyrstu atløgu, men Rúni Nolsøe tekur ímóti og setir bóltin róliga í netið. HB hevði fleiri møguleikar í seinna hálvleiki, sum tó vóru misnýttir. Ein ruddiligur og uppiborin sigur til HB, sum kom væl frá byrjan, men spurningurin er eftir hetta avrikið, um NSÍ yvirhøvur fer at vera við í oddinum í ár.



*Andrew av Fløtum hevði ein góðan dag í álopinum. Umframt at leggja upp til okkurt málið, settið hann brotssparkið í netið. HB verður ein av oddafiskunum í ár, um hesin dysturin er eftirfarandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Tór-Ingar Akselsen, høgrumegin, og Bjarni Jørgensen hjá HB høvdu gott tak á Jónstein Petersen og hinum í NSÍ, sum fingu eina vána byrjan uppá hetta kappingarárið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum:

**HB – NSÍ 4-0 (2-0)**
1-0: Uni Arge
2-0: Andrew av Fløtum, br.
3-0: Hans á Lag
4-0: Rúni Nolsøe

HB: Bárður Johannesen – Hans á Lag, Tór-Ingar Akselsen, Jóhannus Joensen, Jón Rói Jacobsen – Hallur Danielsen, Bjarni Jørgensen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen – Uni Arge Andrew av Fløtum
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjálvur Nielsen, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard, Sjúrður Jacobsen – Helgi L. Petersen, Kári Hansen, Pól Thorsteinsson, Jónstein Petersen – Sonni L. Petersen, Óli Hansen